Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Samskifti við donsku stjórnina um málsøkjabýti

Spurningar:

1. Hvat samskifti hevur verið millum donsku stjórnina og landsstýrið um málsøkjabýtið millum Danmark og Føroyar í samband við møgulig tiltøk í samband við kríggið í Ukraina?
2. Umráðandi er fyri Løgtingið at fáa tilfar, tá slík álvarsmál skulu viðgerast, og tí verður løgmaður spurdur, um hann kann lata løgtingsfólkum møguligt bræv/skriv, ið er komið frá donskum myndugleikum í samband við málið um møgulig tiltøk í samband við kríggið í Ukraina?

Viðmerkingar:
Løgmaður hevur upplýst í Løgtinginum í sambandi við svar til ein skrivligan spurning frá undirritaðu, at danskir myndugleikar hava vent sær til føroyskar mynduleikar í samband við uppskotið um tiltøk í samband við kríggið í Ukraina.

Hóast spurt varð í løgtingssalinum, so kom løgmaður ikki nærri inn á hetta, annað enn at hetta snúði seg um málsøkjabýtið. Tískil fekk Løgtingið ikki nærri greiðu á, hvat hetta samskiftið snúði seg um.
Løgmaður hevur fleiri ferðir víst á, at semjusøkjandi tíðir eru í sokallaða ríkisfelagsskapinum, tí átti ongin forðing verið fyri, at løgmaður læt Løgtinginum eitt møguligt skriv ella bræv.

Fyri at fáa greiðu á hesum máli verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 29. apríl 2022

Beinta Løwe Jacobsen